# Vegabyggingin komin í hæddina — nú viðlíkahald

## Bergholið í Eysturoynni tikið í nýtslu, og meiri enn helmingurin av fólkinum í landinum hevur nú vegasamband

— Við at taka í nýtslu eitt berghol aftrat, samstundis sum meiri enn 60% av landsins fólki hevur fingið vegasamband hvørt við annað, eru vit komin í hæddina við vegabygging í Føroyum. Nú verður talan um ábøtur og viðlíkahald av ti, sum er gjørt heldur enn týdningarmiklar broytingar.

Soleiðis metir Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur, støðuna í vegabyggingini í Føroyum.

Hann var fyrsti røðari undir einum hátíðarhaldi við eystara bergholsmunnan, tá bergholið í Eysturoynni varð latið upp fyri almennari ferðslu týsdagin.

### 42 milj. kr.

Mikkjal Helmsdal upplýsti, at nýggja vegakervið saman við brúnni um Streymin hevur kostað tilsamans einar 42 milj. kr.

Tað er byggifelagið Pihl & Søn, sum hevur staðið fyri arbeiðinum upp á bergholið, ið er hálvan triðja kilometur langt. Landsverkfrøðingurin hevur havt arbeiðið upp á vegirnar hvørjum megin bergholið um hendur.

### Deyðsríkið

Tey mongu deyðsføllini í sambandi við ferðing eftir landi hesi seinnu árini vórðu eisini nevnd í røðunum undir hátíðarhaldinum.

Landsstýrismaðurin í vegamálum, Dánjal Pauli Danielsen, segði seg vóna, at tann nógvi peningurin, sum er brúktur til hetta endamálið, ikki fer beinleiðis til deyðsríkið.

Atli Dam, løgmaður, legði dent á, at avmarkingar verða í ferðsluskaðum í framtíðini.

### Fyritreyt — fyriskipan

Annars fegnaðust bæði Dánjal Pauli Danielsen og Atli Dam um nýggja vegakervið.

Dánjal Pauli Danielsen segði, at fyritreytin fyri einum nútímans samfelag eru vegagerðir, sum henda dagin vórðu tiknar í nýtslu.

Løgmaður segði, at vegakervið gevur hvørjum einstøkum akførara góðar møguleikar at ferðast við rutum.

— Á tí økinum er eisini nakað hent, men kortini kann ikki sigast, at nóg væl er fyriskipað enn, segði Atli Dam.

### Samkoma á Alv-skúlanum

Aftan á at løgmaður hevði klipt snórin og lýst nýggja vegakervið klárt at taka í nýtslu varð samkoma fyri arbeiðsmonnum og øðrum á Alv-skúlanum við Áir, har røður eisini vórðu hildnar.



Tann fyrsti bilurin til reiðar at koyra gjøgnum nýggja bergholið



Nógv fólk var samankomið til hátíðarhaldið við eystara bergholsmunnan

# Framføra spælimenninar á mentunarviku í Kópavogi

## Úr føroyska vinarbýnum Klaksvík luttaka Vilhelm Johannesen og Árni Absalonsen

Sjónleikarfelagið í Kópavogi fer at framføra eina íslendska uppseting av Glataðu Spælimonnunum á mentunarvikuni har í býnum í døgunum 16.—24. oktober. Rithøvundurin, William Heinesen, er boðin til Íslands til frumframførsluna.

Hetta er fyrsta mentunarvika av sínum slagi, sum Kópavogur skipar fyri, og býurin hevur boðið umboðum fyri allar vinarbýirnar at luttaka á stevnuni. Úr Klaksvík fara formaðurin í mentunarnevnd býráðsins, Vilhelm Johannesen, blaðstjóri, og Árni Absalonsen, útvarpsmaður, at luttaka.



Vilhelm Johannesen

Annars verða umboð úr vinarbýum Kópavogs í Danmark, Svøríki, Noregi, Finlandi og Álandsoyggjunum. Roynt verður eisini at fáa umboð úr Grønlandi. Nordisk Kulturfond hevur samtykt at fíggja mentunarvikuna.

### Fyrilestrar og framsýningar

— Klaksvíkar kommuna fekk innbjóðing í mai mánaða, og hesar seinastu dagarnar hava umboðsmenninir hiðani gjørt ymiskar fyrireikingar, sigur Vilhelm Johannesen.

Tað er ætlanin, at hvør vinarbýur skal fáa ein dag á stevnuni.

— Soleiðis fara vit at halda fyrilestrar í tilsamans 45 minuttir um Klaksvíkar bý, alt frá tí søguliga til dagin í dag, sigur Vilhelm Johannesen.

Harumframt er ætlanin at vísa tveir filmir úr Klaksvík, sum skulu vísa broytingarnar í býnum hesi seinastu 20 árini. Tann eldra filmin hevur Robert Joensen tikið. Eisini er ætlanin at hava eina framsýning um Klaksvík á stevnuni. Framsýningin kemur at umfata skrivligar frágreiðingar og myndir frá felögum, skúlum o.o. Somuleiðis



Árni Absalonsen

er ætlanin at framsýna bøkurnar hjá rithøvundunum í Klaksvík og eitt listaverk hjá hvørjum listafólki í býnum.

— Alt framsýningartilfarið verður sent við Smyrli til Íslands umleið 15. september, upplýsir Vilhelm Johannesen.

### Blaðið

**Av tekniskum orsøkum lat tað seg ikki gera at fáa blaðið út mikudagin. Sosialurin biður lesararnar og lýsararnar orsaka. Vit vóna, at vit aftur kunnu koma út regluliga sum áður.**